# Eto’o fyri triðju ferð

**25 ára gamli Samuel Eto’o úr Cameroun er triðja árið á rað kosin sum besti afrikanski fótbóltsspælarin**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað va rikki bara í Føroyum, at tað var stutt millum atkvøðurnar leygardagin.

Tá gerast skuldi av, hvør var besti afrikanski fótbóltsspælarin í fjør, vóru bara tvær atkvøður á muni millum tey bæði fremstu evnini. Hesi vóru Baracelona-spælarin Samuel Eto’o úr Cameroun og Didier Drogba av Fílabeinsstrondini, sum annars spælir í Chelsea.

Tað var tó ikki so øgiliga óvæntað, at valið skuldi fella á Et’o. Tá landsliðsvenjarar og -liðformenn í heyst skuldu atkvøða um besta spælaran í heiminum, gjørdist cameroun-framherjin nummar trý. Og tað er hæsta plasering, sum ein afrikani hevur fingið í teirri atkvøðugreiðsluni, síðani George Weah úr Liberia fyri níggju árum síðani varð kosin besti spælarin í heiminum.

## Loysir seg at stríðast

Hetta var triða ferðin á rað, at Samuel Eto’o fekk hendan heiðurin, og hann duldi ikki fyri, at hann sera fegin um hetta.

Undir takkarrøðu síni segði Barcelona-framherjin, at hetta var eitt tekin um, at tað loysir seg at stríðast fyri sínum málum. Við hesum sendi hann eisini eina vón til mongu smádreingirnar, sum í dag spæla við bóltunum kring alt Afrika. Og eisini til politisku støðuna, har heimsparturin framvegis eigur nógv tung tøk eftir, um vinnast skal á fátækkradøminum, sum hevur eyðkent støðuna har um leiðir í so nógv ár.

Sum sagt, so gjørdist Didier Drogba úr Chelsea nummar tvey. Og hann hevði ein liðfelaga undir liðini á sær á listanum. Nummar trý gjørdist nevnliga Michael Essien, sum eisini spælir við ensku meistarunum.



*Ílætin siðbundnu robuni var tað ein sera fegin Eto’o, sum triða árið á rað tók móti heiðrinum sum ársins spælari í Afrika*
*Mynd: Reuters*

## SUNSET KAPPINGIN

KVINNUR

FM-bólkurin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 121 | 101 | 20 | 8 |
| 2 | Stjørnan | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 124 | 106 | 18 | 6 |
| 3 | VB | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 105 | 123 | -18 | 4 |
| 4 | Kyndil | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 99 | 119 | -20 | 2 |

Sunset-kappingin
Niðari bólkurin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 125 | 101 | 24 | 8 |
| 2 | Søljan | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 116 | 100 | 16 | 8 |
| 3 | Tjaldur | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 111 | 128 | -17 | 2 |
| 4 | VÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 100 | 123 | -23 | 2 |

## ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

MENN

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 433 | 366 | 67 | 16 |
| 2 | Kyndil | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 423 | 379 | 44 | 15 |
| 3 | VÍF | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 437 | 422 | 15 | 15 |
| 4 | StÍF | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 407 | 401 | 6 | 14 |
| 5 | KÍF | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 397 | 431 | -34 | 6 |
| 6 | Neistin | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 410 | 508 | -98 | 1 |



Les Sosialin so ert tú við

# Niðurflytingin avgjørd

**VÍF og Tjaldur mugu komandi kappingarár eina deild niður at spæla**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skal metast eftir gongdini og arbeiðssetninginum síðani jólasteðgin, so var hetta tó ikki so óvæntað. Vitandi, at talan kortini verður um at byggja eitt nýtt lið upp, hevur VÍF mest sum sett sett við av nýggjum, og her og nú hevur tað kostað eina niðurflyting.

Vónin er tó sjálvandi, at hetta arbeiðið kortini er nakað, sum fer at bera ávøkst í framtíðini. Og tað er kanska heldur ikki so ósannlíkt.

Framtíðin var tó ikki sunnudagin. Tá var tað kaldur veruleiki, og hesin staðfesti, at Søljan við einum sigri fekk bjargað síni tilveru í Sunset-deildini. Talan var annars um ein rættiliga javnan fyrra hálvleik, men stutt eftir steðgin skrædnaði millum liðini. Eftir lítlum korteri hevði Søljan strítt seg fýra mál framum, og tann munin fekk VÍF ongan tíð aftur.

## Fyrsti sigurin

Fyri fyrstu ferð í tvey ár eydnaðist kvinnuliðnum hjá Tjaldri at vinna landskappingardyst.

Hetta hendi, tá StÍF var á vitjan í Runavík leygardagin. StÍF hevur annars víst seg sum sterkasta liðið í niðara Sunset-bólkinum, og tí mundu tey flestu vænta, at talan fór at gerast um tryggan útisigur, men Tjaldur vildi tað tó øðrvísi.

Hóast sigurin, so mugu tey í Tjaldri tó staðfesta, at tað ikki varð í ár, at felagið skuldi bíta seg fast í ovara partin av føroyskum kvinnuhondbólti. Saman við V´FI, so noyðist Tjaldur eina deild niður at spæla komandi heyst. Men gongur fyrri parturin av tí setninginum væl, bíðar aftur eitt møguligt uppflytingarspæl.

Tíverri hava vit ikki móttikið nakran dómaraseðil úr Runavím, so vit hava ikki hagtølini fyri dystin.

### FAKTA

Fakta um dystirnar
VÍF-Søljan 19-25 (8-9)
Málskjúttar
VÍF Jacklin Durhuus 10(4), Torgunn H. Johansen 4(1), Heidi Joensen 3(1), Finngerð Joensen 2
Søljan: Hertha Simonsen 5, Heidi Maria Akselsen 5(3), Fía Selma Nielsen 4, Arnleyg Haraldsen 3, Sólja Jóanesdóttir 2(1), Petra Thomassen 2, Erla Samuelsen 1, Jana Jacobsen 1, Louisa Niclasen 1, Irdi Mikkelsen 1
Brotskøst: VÍF 7, Søljan 5
Útvísingar: VÍF 2, Søljan 2
Dómarar: Rúni Mohr & Hartvig Joensen

Tjaldur-StÍF 28-23
Eingin dómaraseðil móttikin

# Høllin fyri nevndina

Eitt av evnunum, sum hevur verið nevnt sum kanska avgerandi faktorur í valdystinum um formanssessin er fótbóltshøllin, sum FSF hevur samtykt at stuðla.

Tá freistin at søkja um hendan stuðulin var úti, vóru tríggjar umsóknir innkomnar. Men av hesum hevur FSF bara viðgjørt tvær teirra víðari. Hetta tí verkætlanin, sum Havnar Timburhandil sendi inn, meira var at rokna sum eitt hugskot til, hvussu ein slík høll skuldi byggjast. Soleiðis innihelt tann ætlanin ikki nakra fíggjarætlan fyri rakstrarpartin, eins og tað heldur ikki var staðfest, hvar í landinum hendan skuldi byggjast.

Í formansfrágreiðingini vísti Óli Holm á, at tað enn ikki er tikin endalig støða til spurningin um, hvørja høll FSF velur at stuðla.

Avgerð er tó tikin um, at ávís krøv skulu áleggjast verkætlanunum. Millum annað kræv um dokumentatión fyri fíggingingini og at raksturin kemur at liggja í tryggari legu.

Á nevndarfundi í næstum fer aðalnevndin hjá FSF at taka støðu til, hvørjum umsøkjara tey fara at veita prinsipiellan stuðul.

**-mørk**